# TILTØK

**Gudstænastur Jólaaftan**
*Havnar kirkja:* kl. 15, Sonja Klein, donsk gudst.
Kl. 17 Bjarni Bæk
*Hvítanes:* kl. 17, Jóannes Fonsdal
*Vesturkirkjan:* kl. 15, Bergur D. Joensen.
Kl. 17, Heri Joensen
*Argja kirkja:* kl. 15, Heri Joensen.
Kl. 17 Bergur D. Joensen
*Norðradalur:* kl. 13.30, Bergur D. Joensen
*Kvívík:* kl. 17, Marjun Bæk
*Hósvík:* kl. 15.30,
*Hvalvík:* kl. 17, Mogens T. Christensen
*Norðskála:* kl. 17, Emil Olsen
*Sandavágur:* kl. 17, David Johannesen
*Miðvágur:* kl. 17, deknagudst. (Talvan gongur fyri Missiónshúsið)
*Glyvrar:* kl. 16,
*Rituvík:* kl. 17.15, Meinhard Bjartalíð
*Fríðrikskirkjan:* kl. 17, Martin R. Jacobsen
*Gøta:* kl. 17, lestur
*Skála:* kl. 16, (Sct. Lucia)
*Sjóvar kirkja:* kl. 17.15 Barnakórið, Jógvan Fríðriksson
*Funningsfjørður:* kl. 14.30,
*Fuglafjørður:* kl. 16,
*Leirvík:* kl. 17.15, Uni Næs
*Øravík:* kl. 15, Jónsvein Bech
*Vágur:* kl. 17, Patrick de Neergaard
*Vestmanna Ítróttarhøll:* kl. 17, gudst. Inga P. Dam
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 14,
*Christianskirkjan:* kl. 17 Hans Eiler Hammer
*Árnafjørður:* kl. 17, Niels Pauli Danielsen
*Viðareiði:* kl. 17, Elsa Funding
*Húsavík:* kl. 16.30
*Sandur:* kl. 18, Jákup R. Hansen

**Jóladagur 25. des.**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
Kl. 18 Sonja Klein
*Kaldbak:* kl. 18 Jóannes Fonsdal
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Argja kirkja:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, Bergur D. Joensen. (Talvan gongur fyri kirkjuna)
*Christianskirkjan:* kl. 11, (Talvan gongur fyri Emmaus) Hans E. Hammer
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Viðareiði:* kl. 12. (Talvan gongur fyri Missiónshúsið)
*Hvannasund:* kl. 17, Elsa Funding
*Kollafjørður:* kl. 12,
*Vestmanna:* kl. 16.30,
*Hósvík:* kl. 18 Marjun Bæk
*Kvívík:* kl. 12,
*Landasandur:* kl. 15,
*Haldarsvík:* kl. 17, Mogens T. Christensen
*Eiði:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa. Kl. 20 (Sangkór – talvan gongur fyri missiónshúsið Karmel)
*Gjógv:* kl. 17,
*Funningur:* kl. 18.30, Emil Olsen
*Saksun:* kl. 11
*Hvalvík:* kl. 12
*Miðvágur:* kl. 12,
*Bøur:* kl. 17, David Johannesen
*Sandavágur:* kl. 12, deknagudst. (Talvan gongur fyri Meinigheitshúsið)
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Gøta:* kl. 12,
*Æðuvík:* kl. 16,
*Nes:* kl. 18, Martin R. Jacobsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 12 (Effata, talvan gongur fyri Missiónshúsið) Niels J. Nielsen
*Selatrað:* kl. 12
*Oyndarfjørður:* kl. 17, (Horntónleikur)
*Skála:* kl. 19 (Kórini í Meinigheitshúsinum – talvan gongur fyri Meinigheitshúsið), Jógvan Fríðriksson
*Elduvík:* kl. 12,
*Hellurnar:* kl. 16,
*Fuglafjørður:* kl. 18, Uni Næs
*Fámjin:* kl. 12,
*Tvøroyri:* kl. 18 (Talvan gongur fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar) Jónsvein Bech
*Vágur:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30,
*Sandvík:* kl. 18 Ólavur Rasmussen
*Leiti:* kl. 12,
*Sumba:* kl. 16,
*Porkeri:* kl. 18 Patrick de Neergaard
*Dalur:* kl. 12
*Skopun:* kl. 18 (Barnakór) Jákup R. Hansen

**2. Jóladagur – 26. des.**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannes Fonsdal
*Nólsoy:* kl. 12 Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Hestur:* kl. 12, Heri Joensen
*Tjørnuvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 12, Mogens T. Christensen
*Norðskála:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa, Emil Olsen
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Gøta:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Selatrað:* kl. 12, (Talvan gongur fyri Missiónshúsið) Niels J. Nielsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, (Horntónleikur) Jógvan Fríðriksson
*Leirvík:* kl. 12, Uni Næs
*Bøur:* kl. 12 Bjarni Bæk
*Sandavágur:* kl. 12 Inga P. Dam
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Tvøroyri:* kl. 11, Jónsvein Bech
*Hov:* kl. 12,
*Vágs eldrasambýli:* kl. 16, Patrick de Neergaard
*Sumba:* kl. 12 Ólavur Rasmussen
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels P. Danielsen
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10,
*Árnafirði:* kl. 11, altarg.
*Christianskirkjan:* barnagudstænasta kl. 15, Hans Eiler Hammer
*Kirkja:* kl. 15
*Hattarvík:* kl. 17, Elsa Funding
*Skálavík:* kl. 12 Jákup R. Hansen

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnudagin 2. jóladag, familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti kl. 12. Á báðum møtunum verður luttøka av útisetum. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudaginsskúlin er kl. 12. www.livdin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Jólaaftan kl. 15 Gudstænasta.
2. jóladag kl. 11 Gudstænasta v/ Jóna Johannesen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Jólaaftan kl. 17 Jólagudstænasta.
1. jóladag kl. 9 Jólatónar við Landssjúkrahúsið, kl. 11 Hátíðarmøti.
2. jóladag kl. 16 Jólaveitsla fyri alla familjuna.
Hósdagin 30. des. Jólaveitsla fyri vaksin kl. 17.

**Missiónshúsið við Landavegin**
2. jólakvøld kl. 18 Møti.

**Frá Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 15 Barnamøti.
Leygardagin – jóladag kl. 18 Møti.
2. jóladag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Jólaaftan kl. 16 Jólagudstænastan.
Mánadagin 27. des. kl. 20 Bønarskúlin.
Nýggjársaftan kl. 22 Nýggjárshald.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 26. des. (2. jóladag) verður Morgunmøti. Á møtinum talar Sverri Steintún.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 28. des. í KFUK: Jólafestir: Fyri várgleði, spírir, títtlingar og onnur kl. 16 og fyri vaksin kl. 19.30. Inngangur við Hera Joensen, presti.

**Katólska kirkjan**
Jólanátt 24.12. kl. 24.00 Midnáttarmessa í kirkjuni.
1. jóladag kl. 11 Hámessa í kirkjuni.
2. jóladag kl. 11 Hámessa í kirkjuni.
Mánadagin 27. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Týsdagin 28. kl. 11.30 Messa í Kerit. Kl. 14.30 Jólaveitsla fyri børnini.
Mikudagin 29. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Hósdagin 30. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Fríggjadagin 31. kl. 11.30 Messa í Kerit.
Nýggjársdag kl. 11.00 Hámessa á kirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
2. jóladag kl. 18 Møti v/ Aksel Jacobsen
Sunnudagin 2. januar kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Sverra Steinhólm, Gratia syngur.
Mánadagin 3. januar kl. 20 Heimsbønarløta.
Týsdagin 4. januar kl. 20 Heimsbønarløta.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Jólaaftan kl. 15 Jólaaftansgudstænasta,
kl. 17 Jólaaftansgudstænasta.
Sunnudagin 26. des. kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Jólaveitslurnar verða mánadagin 27. des. kl. 16.00 fyri børnini v/ Vivi Hammer, Elsie og Magna Christiansen o.ø. kl. 19 fyri teimum vaksnu v/ Mogens T. Christensen, presti, Magna Christiansen o.ø.

**Miðvágs Missiónshús**
Jólafestin verður 27. des. kl. 19.00 og jólatræ fyri børnum 28. des. kl. 17.00. Hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar missiónshús**
Jólatræ verður 2. jóladag kl. 16.00. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Tollaksmessukvøld kl. 21 »Vit syngja jólini inn« við sangi, framførslum og hugna. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Samkoman Lívsins Orð Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Lindu og Goodwin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betesda, Norðoyggjar**
Jólaaftan kl. 16 Jólaløta fyri alla familjuna.
1. jóladag kl. 18 Sjómansmøti.
2. jóladag kl. 18 Vintnisburðarmøti.
Nýggjársveitslurnar fyri børn verða hósdagin 30. desember, kl. 15: Børn undir skúlaaldur, kl. 19: Børn í skúlaaldri.
Nýggjársaftan kl. 19: Veitsla fyri vaksin.

**Soli Deo Gloria**
2. jóladag kl. 18 Møti.
Jóla- og nýggjársveitsla verður nýggjársdag kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkolmin.

**Getsemane, Klaksvík**
2. jóladag kl. 18.00 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Mánakvøldið 27. des. kl. 19.00 verður jólaveitslan fyri vaksin.
Týsdagin 28. des. verða jólaveitslurnar fyri børn: kl. 15.00 Børn í 1. flokki og undir skúlaaldur og kl. 19.00 Børn frá 2.-7. flokk. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Jólafestin fyri børn undir og í skúlaaldri saman við familjuni verður 28. des. kl. 16. Børn framføra jólaleik. Jólamaðurin vitjar.
Jólafestin fyri tey vaksnu verður 8. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Jólaaftan einki møti.
1. jóladag kl. 18 Møti, Streingjakórið syngur, Eyðun Christiansen talar.
2. jóladag kl. 15 Jólafest fyri børnunum.
Mánadagin 27. des kl. 18 Jólafest í bygdarhúsinum í Lopra.

**Ørkin, Reykjavík**
Leygarkvøldið 8. januar kl. 20.30 verður hugnakvøld v/ Sigrið og Jóannis Fonsdal. Sunnudagin kl. 15 verður Gudstænasta í Háteigskirkju, har Jóannis Fonsdal prædikar. Aftaná verður kaffi í Ørkini.

# BRÚDLEYP

Leygardagin 25. desember kl. 14.00 giftast í prestagarðinum í Vestmanna Manuela Stan úr Buhusii, Rumenia og Janus Jensen úr Vestmanna. Døgurði verður fyri innbodnum. Tey, ið vilja heilsa uppá brúðarparið, eru hjartaliga vælkomin at fáa sær ein drekkamunn eftir kl. 19.00 í heiminum hjá Kristjani Jensen.

Týsdagin tann 28. desember 2004 kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Marin Strøm úr Vestmanna og Janus Læarsson úr Havn. Veitslan verður fyir innbodnum í Odd Fellow á Grønlandsvegi 56 í Havn.

Fríggjadagin 31. desember kl. 11.00 giftast í Ebenezer, Gvøðny Steensen, Tórshavn og Janus Gunnarsson, Kollafjørður. Aftaná vígsluna verður móttøka í Ebenezer. Brúdleypsveitslan verður fyri innbodnum í Missiónshúsinum í Kollafirði kl. 18.00.

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Gunn Mortensen, Tórshavn og Arne Mikkelsen, Hoyvík. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 8. januar 2005 verða Súsanna í Stórhúsi og Kim Ejdesgaard vígd í Býráðssalinum í Havn kl. 10.00. Vælkomst til brunch verður í Róðrarneystinum á Argjum frá kl. 11.00-17.30.

Leygarmorgunin hin 22. januar 2005 kl. 11.00 giftast í Kelduni í Skálafirði Tórfríð Arnfríðardóttir Jacobsen, úr Skálafirði og Dan Danielsen, av Strondum. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum á Strondum frá kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á teirra stóra degi, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 442071, 250727, 448039 ella 748039 áðrenn 14. januar.

# SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 28. desember hava Malan og Petur Kjærbo á Kambsdali verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni á Thulevej 426, 6715 Esbjerg N, Danmark.

Hósdagin 30. desember hava Sólgerð og Hjørleif Gaard, Oyndarfirði verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum fyri innbodnum kl. 19.00.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Epistulin er skrivaður í Hebrearabrævinum 1. kap. 1.-mitt í 5. v.*

Eftir at Guð í forðum mangar ferðir og á mangan hátt hevði talað til fedrarnar gjøgnum profetarnar, hevur hann við endan á hesum døgum talað til okkara gjøgnum sonin, sum hann setti til arvinga til allar lutir, og sum hann eisini hevur gjørt heimin við. Hann, sum er ljómin av dýrd hansara og avmyndin av veru hansara og ber allar lutir við orði veldis síns, hann settist, tá ið hann hevði gjørt reinsan fyri syndirnar, við høgru hond á hátignini á høgum himni, og er vorðin tann mun mætari enn einglarnir, sum hann hevður arvað dýrabærari navn enn teir. Tí at við hvønn av einglunum hevur hann á nøkrum sinni sagt: »Sonur mín ert tú, í dag havi eg føtt teg?«